nøkrum møguleikum. Men tað er givið, at tá vit hyggja at trupulleikunum í Føroyum, so tørvar okkum ikki kapital. Tað er ein spurningur, hvussu hann verður umsettur og fer at virka her í Føroyum.

Bjarni Djurholm er púra samførdur um, at tað almenna skal taka seg úr tí virksemi tað er í og sum ber til. Tað almenna skal jú eisini royna at sleppa sær undan teimum útreiðslum tað hevur við at hava hesi aktivini. - Vit gjalda 150 mill. kr. barav í rentum um árið. Tað er ein stórur postur á fíggjarlógini. Tað er eisini týdningarmikið, at tað almenna kann seta í verk ein skattareform, sum merkir, at tað er áhugavert hjá øðrum, sum koma henda vegin, at gera íløgur í Føroyum. Og eisini mótvegis løntakarunum er tað týdningarmikið, at vit kunnu hava eina skattaskipan, sum ger, at serliga tann tímalønti kann kenna seg tryggan, sjálvt um bruttolønin ikki hækkar.

Landsstýrismaðurin sigur víðari, at vit hava virkuliga nógv stór mál og tøk fyri stavn. Tað er tí ein spurningur um bæði arbeiðsmarknaðarpolitikk, skatta- og avgjaldspolitikk og vinnupolitikk. - Eg veit, at hetta landsstýrið er fyri at gera broytingar tað komandi árið og tað fer ólavsøkuróðan m.a. at endurspegla leggur hann aftrat.

Hóast afturgongd í samfelagnum, so heldur Bjarni Djurholm, at vit kortini ikki mugu gloyma, at tað eisini eru positiv viðurskifti í samfelagnum. Sjálvur er hann serstakliga fegin um gondina innan alivinnuna. – Tað, sum vísir seg at ganga nógv skjótari, enn vit tordu at vænta, er tann sannroynd, at stórur framburður fer fram innan aling. Eitt nú er stórur áhugi fyri toskaaling.Tað eru tí góð útlit til, at innan fyri eitt ella tey ár sær tann vinnan totalt øðrvísi út enn hon ger í dag.



Frá hátíðarhlaidnum, tá Atlants Kolvetni varð skrásett á virðisbrævaamarknaðinum

# Fleiri føroysk feløg megna at fara á virðisbrævamarknaðin

VIRÐISBRÆVA-MARKNAÐUR

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað er nú góð vika síðani, at føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni skrásetti seg á føroyskum íslendskum virðisbrævamarknaði. Tá hevði hitt føroyska oljufelagið, Føroya Kolvetni longu verið skrásett á virðisbrævamarknaðinum í London í eina tíð. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í oljumálum sigur við Portalin seg vera sera fegin um, at føroyingar hava tikið stig til at fáa tevy oljufeløg. Einaferð var frammi eisini at seta á stovn eitt alment føroyskt oljufelag. Sjálvur heldur landsstýrismaðurin, at tað er ein skilagóð gongd við tveimum privatum oljufeløgum.

– Eg haldi tað er sera flott, at vit longu hava tvey oljufeløg, sum bæði eru, skrásett á altjóða virðisbrævamarknaðum, ta eina í London og hitt í Føroyum/Íslandi. Signalvirðið í hesum er sera heppið og gott fyri føroyska vinnu sum so, og serliga tað at vit hava feløg, sum megna at koma á virðisbrævamarknaðin, tí tað krevur sera nógv av teimum, sum sita í hesum feløgum. Eg vildi ynskt, at fleiri føroyskar fyritøkur umhugsaðu at skráseta seg, so vit harvið fingu størri rensl í peningakervið í Føroyum , soleiðis at tað aftur kom vinnuni til góðar.

Landsstýrismaðurin heldur tað finnast fleiri føroysk feløg, sum hava so mikið professionella leiðslu, at tey megna hetta. Tað er ein spurningur um hugburð.



# 2006 avgerandi fyri føroyska oljuleiting

OLJULEITING

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nú landsstýrið hevur gjørt av at seta ein stjóra fyri teir báðar týðandi oljustovnarnar Jarðfrøðissavnið og Oljufyrisitingina sigur landsstýrismaðurin í oljumálum, Bjarni Djurholm, við Portalin, at nettupp komandi árið hjá nýggja stjóranum verður kanska tað mest avgerandi árið fyri áhugan at leita eftir olju á føroyskum øki í framtíðini. – Eg livi í teirri trúgvi, at í 2006 fara royndarboringar at vísa, at vit hava kolvetni í undirgrundini í nøgdum, sum um nøkur ár fara at vísa seg at vera rakstrarverdugar. So hóast vit ikki raka við olju komandi ár so trúgvi eg, at tey úrslitini fara bera á tað borðið. Tað tykist fyri mær, sum at áhugin fyri økinum er spakuliga vaksandi aftur, og tað er sera positivt. So sæð frá mínum sjónarvinkli verður 2006 eitt sera avgerandi ár fyri oljuleiting á føroyskum øki, í hvussu er í fyrsta umfari.



Boring á landgrunninum í næsta ár verða avgerandi

Bjarni Djurholm er sannførdur um, at tað, sum hendir hinumegin markið, er tað, sum hevur skapt nýggjan áhuga fyri føroyska økinum. -Vit kunnu staðfesta, at teir somu strukturarnir, sum eru í bretskum øki, síggjast eisini aftur okkara megin markið. Og har hevur tað víst seg, at fundini eru í rakstrarverdugum nøgdrum. – Fáa vit boringar longur norðuri á basaltøkinum, og tað har fer at vísa seg at vera kolvetni, so er tað sera áhugavert.